## DAGSINS MEINING

# Fortreytir fyri lønarafturhaldi vanta

Landsstýrið og arbeiðsgevararnir mana staðiliga til afturhald við lønarkrøvum. Verða lønarkrøvini hjá verkafólkinum gingin á møti, fer hetta at føra til versnandi kappingarføri og búskaparligar trupulleikar, verður sagt. Men her er nakað, sum ikki hongur saman. Fyri tað fyrsta eru tað føroyskir búskaparfrøðingar, sum vísa hesum aftur. Okkara arbeiðsmarknaður er ikki altíð beinleiðis sambariligur við útlendskar arbeiðsmarknaðir. Eisini benda hagtølini frá fakfeløgunum á, at sannleikin ikki er so einsíðugur, sum arbeiðsgevararnir vilja vera við. Hartil kemur, at kappingarføri snýr seg um annað og meira enn lønarútreiðslur.

Í tosinum um lønarafturhald tykjast arbeiðsgevarar og landsstýri at gloyma, at tær mest grundleggjandi fortreytirnar fyri lønarafturhaldi vanta. Hesar fortreytir fevna um at varðveita og endurreisa vanligar vælferðarágóðar soleiðis, at Føroyar ikki bert gerast eitt land fyri meðal- og yvirstættina. Í staðin fyri eina rættvísa skattaskipan, fáa vit ein súmbolskan skattalætta, sum í veruleikanum bert gagnar meðal- og yvirstættini. Í staðin fyri at taka matvøru-MVG og tað tyngjandi oljugjaldið av, lata myndugleikarnir bara standa til.

Tað er sera hart at vera ung barnafamilja og skula liva av tveimum arbeiðsmannalønum í dag. Fólk skulu rinda rentur og avdráttir, um tey eru so heppin at eiga hús. Eru tey ikki húsánarar, skal leiga rindast við vánaligum útliti til nakrantíð at seta fót undir egið borð. Hartil koma gjøld til dagstovnar ella dagrøkt, ÚF- og SvF-gjøld, trygging, flutningur, klæði og skúlabøkur, olju- og SEV-rokningar og lítil og eingin møguleiki at spara saman til ellisárini. Løntakarin er at kalla verjuleysur, og teir ráðandi tykjast ikki skilja hansara støðu. Hann hevur bert eina verju, og tað er hansara fakfelag. Enn verri er pensionisturin stillaður. Hann hevur einki fakfelag og er púra undirlagdur politikarana náði og ónáði.

Við bakstøði í hesum veruleika kann øll landsstýrisins tala um minkaðan blokk, búskaparlig metár og lønarafturhald tykjast óviðkomandi og beinleiðis kensluleys, tí stórir partar av fólkinum eru við at dragna afturúr í vælferðarsamfelagnum. Tað er týðuligt, at hvørki arbeiðsgevarar ella landsstýri veruliga vita, hvussu harður gerandisdagurin hjá eini láglønarfamilju ella einum fólkapensionisti er. Her hugsa vit ikki minst um tey, ið arbeiða á fiskavirkjunum. Við hesum er so eisini sagt, at tær mest grundleggjandi fortreytirnar fyri afturhaldi og hóvsemi við lønarkrøvum vanta. Hartil kann leggjast, at soleingi hesar fortreytir vanta, er talan um sera tunt samráðingargrundarlag á arbeiðsmarknaðinum. Hetta áttu samgongufólk at hugsað um og gjørt nakað við heldur enn einvíst at illneitast inn á fakfeløgini. Hetta áttu kanska eisini arbeiðsgevararnir at hava í huga, tá ið teir fara aftur til samráðingarborðið. Og til landsstýrið: ein av tungtvigandi orsøkunum til støðuna er tann ógvusligi blokkniðurskurðurin. Somu menn ætlaðu at kuta allan blokkin vekk her og nú!

Vert er eisini at býta merki í, hvussu landsstýrið roynir at flyta almennar uppgávur og útreiðslur yvir á kommunurnar. Hetta kann í sjálvum sær verða skilagott, men hvat nyttar tað, um hetta er at sammeta við sjálvbodna tvingsul fyri at sleppa tí almenna undan útreiðslum og ábyrgd. Endin kann blíva, at kommunurnar verða noyddar at hækka skattaprosentið og tá verða uppaftur størri byrðar lagdar serliga á tey lágløntu. Tá samgongufólk vísa á skattalættar – og pengar skulu finnast til tað - kann endin jú blíva, at kommunurnar mugu hækka kommunuskattin. Hvat er tá vunnið. Geva við aðrari hondini – taka inn aftur við hinari!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sannleikin trong kor

**Høgni Hoydal**



Hans Pauli Strøm, skrivari javnaðarfloksins, hevur skrivað eina grein um verkfallið og Tjóðveldisflokkin.

Tað átti hann ikki at gjørt.

Tí í fyrsta lagi avdúkar hann harvið enn einaferð, at tann einasta politiska uppíblandingin sum altíð við vissu er á arbeiðsmarknaðinum, kemur frá javnaðarflokkinum.

Og í øðrum lagi avdúkar hann enn einaferð, at sannleikin hevur sera trong kor, tá ræður um politiskt orðaskifti í Føroyum.

**Ósannar grovheitir**

Hans Pauli Strøm leggur Tjóðveldisflokkin undir eina røð av ósonnum uppáhaldum. Burturúr rúgvuni av grovheitum frá Hans Paula Strøm kann eg bert nevna, at hann:

- sigur Tjóðveldisflokkin hava stungið fakfeløg í ryggin. Veruleikin er, at Tjóðveldisflokkurin í øllum sínum politikki hevur bøtt um viðurskiftini og rættindini hjá tímaløntum og hjá øllum øðrum fakbólkum. Og vit hava altíð virt og lagt dent á ábyrgdina hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.
- Sigur undirritaða hava kallað lønarkrøv ábyrgdarleys. Hetta er bein-leiðis ósatt. Eg havi als ikki úttalað meg um ítøkiligu samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum. Tað skulu partarnir sjálvir avgreiða.
- sigur, at Tjóðveldisflokkurin hevur blakað ábyrgdina fyri fyrsta sjúkradegi yvir til fakfeløgini og arbeiðsgevarar at berjast um. Hetta er beinleiðis skeivt. Tað er við lóg álagt arbeiðs-gevarum at gjalda fyrstu sjúkradagarnar. Hetta er altso ein rættur hjá arbeiðarafjøldini, sum alment sett hava í sáttmála. Og í okkara grannalondum rindar arbeiðsgevarin fyri nógv meira enn 1. og 2. sjúkradag.

**Hvør leggur seg út í samráðingar?**

Samanumtikið førir Hans Pauli Strøm somu álop á Tjóðveldisflokkin fram, sum starvsnevnd javnaðarfloksins ger í almennum brævi og sum formaður javnaðarfloksins áður hevur ført fram. Bert eru orðini hjá Hans Paula upp aftur grovari og hatskari.

Men høvdu Hans Pauli Strøm og javnaðarflokkurin hildið seg til sannleikan og veruleikan, so er skjótt at staðfesta, at politikkurin hjá Tjóðveldisflokkurin er greiður. Partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum hava ábyrgd av at semjast um sínar sáttmálar. Vit vilja ikki dragast upp í ósemjurnar. Á almenna arbeiðsmarknaðinum hava vit okkara skyldur sum politikarar, og tær halda vit til lítar.

Tann einasti, sum ikki kennir sína skyldu og roynir at draga partapolitikk upp í samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum, er javnaðarflokkurin.

Tað er veruleikin, sum javnaðarflokkurin prógvar dag um dag.

# Streykusamráðingar og undantaksstøða

**Kaj Leo Johannesen**
*Løgtingslimur*



Nú hendi tað aftur at landið var lagt út í eitt lemjandi verkfall og arbeiðsfólk og fyritøkir kenna sviðan, og koma at kenna sviðan av hesum verkføllum, langt inn í framtíðina.

Hesin ruðuleiki kann ikki og eigur ikki at halda áfram ár eftir ár, okkara arbeiðsfólk og okkara vinnulív, hevur betri uppiborið, um hettar óskilið skal verða okkara besta boð uppá ein skipaðan arbeiðsmarknað, so eru vit fátøk.

Undirritaði gongur inn fyri at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skipað síni viðurskifti, uttan at Løgtingið leggur seg út í trætuna, men um partarnir ikki eru førir at loysa síni viðurskifti, so skal Løgtingið leggja uppí, tað er tí vit eru vald inn á ting.

Hinvegin kann tað ikki verða rætt einans at brúka fáar dagar, og so rópa eftir semingsfólkum, mín meining er, at tá partarnir settu seg at samráðast, so skuldu hurðarnar verði læstar, og síðani lætnar uppaftur, tá nýggjur sáttmáli var undirskrivaður.

Haldi eisini at virðingin og tónalagið er heilt út av lagi vánaligt millum partarnir, og at partarnir tosað ikki veruliga við hvønn annan, men framvið hvørjum øðrum, hettar er sjálvandi út frá teim ofta sensatións kendu útsøgnunum um hóttanir av einum og hvørjum slag, sum hanga í luftini.

Um hesin samráðingarháttur ella hettar tónalagið var nýtt til aðrar samráðingar í øðrum høpi, so hevði tað verði hildið at verði púra burturvið, og so slett ikki framt tað besta úrslitið, og sum Fagfeløgini sjálv siga korini hjá arbeiðsfólki eru ikki nøktandi í mun til aðrar bólkar í samfelagnum, hettar átti at verði eitt gott prógv um at samráðingarhátturin, og tað at streyka annað hvørt ár, er ikki tað besta amboði at røkka nøktandi korum.

Sum sagt undirritaði ynskir alt tað besta fyri partarnir á arbeiðsmarknaðinum men loyvir sær at ivast stórliga í um streykir er tann besti mátin at geva okkara verkafólki tey bestu korini at liva undir.

Persónliga haldi eg tað verða púra burturvið at leggja landið lamið og at lata virðir fyri 100 tals millriónir fara fyri skeytið, so eitt uppskot um at steðga streykuni skuldi eftir mínum tykki verði lagt fyri tingið, eitt er vist, tað verða 100 tals færri arbeiðspláss, um støðan heldur áfram.

Hettar er mín persónliga meining.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Umsitingin ger enda á vælferðarsamfelagnum

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



**Tá lunnar vórðu lagdir undir væferðarsamfelagið fyri 100 árum síðani, samstundis sum ídnaðarliga menningin breyt seg ígjøgnum, var ongantíð ætlanin, at "øll skuldu hjálpa øllum", so at "hjálpin" fór til umsiting og ikki til gomul, veik, sjúk og tey sum trongdu hana.**

Dagliga hoyrist, at pláss ikki er fyri teimum eldru, at framtíðarvánirnar ikki eru serliga bjartar, tí talið økist skjótari enn pláss gerast fyri.- Sama hendir í grannalondunum.

Við ellini fylgja ymiskar sjúkur, eitt nú alzheimers, parkinson, sclerose og ymiskir tættir innan demens. Verður ikki meiri grundleggjandi tikið hond um hesi, koma trupulleikarnir at økjast og gerast uppaftur álvarsligari. Hetta skapir eitt óverdugt lív bæði fyri tey veiku og teirra avvarðandi.

Einki nýtt er í hesi staðfesting, men fleiri og fleiri gerast eldri. Øll vita, at við ellini fylgir eitt og annað, tí hon "kemur ikki einsamøll", sum ofta verður tikið til.

**Vælferðarsamfelagið ikki ein rættur men forrættur**

Av og á fáa vit at vita, at vælferðarsamfelagið er ein fólksins rættur. Eg eri ræddur fyri, at hesin rættur kann gerast nakað tunnur, um vit ikki leggja um í samfelagið okkara.

Vælferðarsamfelagið er og verður meiri ein forrættur enn sjálvsagdur rættur.

Legg til merkis, at fátækradømið, so løgið tað ljóðar, økist lutfalsliga í Norðurlondum,

- So mong falla niður ímillum.

Fyri umleið 100 árum síðani varð lagt til brots fyri at geva teimum veiku og eldru ein enn betri gerandisdag. Hetta hendi samstundis, sum ídnaðarmenningin breyt seg ígjøgnum. Her var sanniliga ikki talan um norðurlendskan uppruna, men heldur ein táttur Norðurlond tóku til sín, broyttu og tillagaðu umstøðurnar.

Tað var ongantíð ætlanin, at grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum skuldi vera, at "øll skuldu hjálpa øllum", sum síðani hevði við sær, at umsitingin av vælferðarsam-felagnum gjørdist so kostnaðarmikil og ineffektiv, at tey, sum veruliga høvdu brúk fyri hjálpini, ikki fingu hana, meðan peningurin fer upp í umsiting.

**Hjálpin til tey ið eiga hana**

Tað verður sagt, at "fyrr vóru fáa, sum sótu uppi í vogninum, meðan mong koyrdu á. Síðani gjørdust tey færri, sum koyra á, meðan tey flestu eru farin upp í vognin"

Støðan í demografiini er, at triðingur av fólki okkara eru pensjónistar, annar triðingur eru skúlanæmingar og lesandi annars, meðan seinasti triðingurin er úti í arbeiðslívinum.

Tí verður tvingandi neyðugt at hyggja nærri eftir umsitingarliga partinum, so at umsitingin gerst helmingin enfaldari, so tey sum ikki nýtast hjálp, sleppa undan umsiting.

Taka landsstýrisfólk okkara við samstarvandi embætis- og starvsfólkum seg ikki um reiggj og venda upp og niður uppá "hjálpina" - tí tað er haðani frá viljin skal verða til broyting - verður ikki livandi fyri tey ið trongja til hana. – Her krevst annað enn at bert verður koyrt eftir "skinnara" uttan hugsjónir. – Spurningur er tí, hvussu landsstýrifólkini hugsa.

Sum politikarar - og serliga vit sum ídag sita við stjórnarvaldinum í Føroyum – hava vit ábyrgd fyri at taka hetta mál upp nógv meiri grundleggjandi og tað má henda beinanvegin.

**Ikki fleiri byrðar á kommunurnar og vinnulívið**

Fleiri ferðir havi eg eisini nevnt bæði á floksfundi, á samgongufundi og frá tingsins røðarapalli, at samstundis sum vit geva skattalætta, leggja vit fleiri dýrkandi lið frá landi til kommunur og vinnulívið, heldur enn at taka trupulleikan við rótini.

Ikki verður lætt at broyta hesa – eftir hondini – siðvenju, men her slepst ikki undan.

Andstøðuflokkarnir eru nú heldur ikki serliga vælleikandi. Í fyrsta lagið leggja teir upp til fleiri kostnaðarmikil og dýrkandi mál, samstundis ákæra teir okkum fyri, at samfelagið er ov dýrt at reka.

Her er tíverri heldur eingin fynd í.

Tað verður tí í stuttum neyðugt at einfaldgera umsiting okkara, so peningurin verður nýttur til veik, sjúk og onnur sum trongja til hjálp, heldur enn eina óendaliga fløkta umsiting, sum tey sum dagliga virka har, sjálvi hava trupult við at skilja. – Neyðugt er at venda vælferðarsamfelagnum á.

Verður hetta ikki tikið upp nú, og flokkarnir í samgongu ikki kunnu semjast um tað, fáa gomul, veik, sjúk og teirra avvarðandi og við hesum alt samfelagið uppaftur størri trupulleikar at berjast við, sum kanska gerast óyvirvinniligir í næstu komandi árum.

# Hvussu ber tað til

at bløð og
útvarp og sjónvarp
eru fylt á tremur
við tíðindum
frásagnum
uttan at taka
til viðgerðar
verkfallið
tann stóra
spurning og
trupulleika
sum rakar okkum
øll
uttan undantak
og sum
øll tosa um
og sum
øll
líða undir

hvussu ber tað til
at nú knappliga
hoyrist ella sæst
eingin klíva í tvey
um hetta
álvarsmál
og hvussu
tað kann verða loyst
við skili og skynsemi

hvar eru tey farin
– øll tey sum javnan
plaga at breiða seg
í bløðum og út- og sjónvarpi
hvussu ber tað til
at eingin kemur
og ripar
nevan í borðið
og krevur
at nú má
skil fáast á

vit
sum annars plaga
at breggja okkum av
at vera eitt av teimum
best skipaðu vælferðardemokratium
í øllum heiminum

skuldu vit ikki verið
før fyri at basa
hesum skilaloysi

hvørjum líkist tað
at umboð
fyri partarnar
koma ikki saman
at samráðast
í dagar og vikur
meðan mjólk
í tíggjutals tonsum
verður stoytt
á sjógv
og meðan virði
fyri hundraðtals miljónir krónur
fara fyri skeytið –

og tað sum skilir partarnar
eru nakrar fáar krónur
–
tá ið sovorðnir spurningar
verða bornir upp á mál
eru teir so ræðandi
at vit tora ikki at taka støðu sjálvi

men er tað ikki júst tað
vit mugu gera
í einum fólkastýrdum samfelag
tú og eg

**Erling S**

# »Hetta svekkar mína støðu«

**Hergeir Nielsen**



Meðan samfelag okkara er úti í eini teirri svárastu kreppustøðuni á arbeiðsmarknaðinum seinastu nógvu árini, er tað hugstoytt at síggja, at menn við politiskari ábyrgd gera sær dælt av hesi vanlukku.

Tað er av sonnum at harmast um, at javnaðarflokkurin ferð eftir ferð undirmetir verkafólkið so mikið grovliga, sum hann ger í royndum sínum at billa verkafólkinum inn, at tjóðveldisflokkurin er partur av stríðnum móti teimum.

Ein øsingin hjá javnaðarflokkinum er, at tað er blivið eitt brotsverk, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum boðar frá, at hann ikki kann gókenna ein lønarsáttmála.

Vildi tað ikki verið munin verri, um landsstýrismaðurin tagdi við so týðandi upplýsingum, spyrja vit?

Vildu ikki somu menn kravt høvdið av honum fyri at dylja týdningarmiklar upplýsingar?

Vit, sum ikki ætlað, at flokspolitikkur skal koma upp í bardagan á arbeiðsmarknaðinum, harmast um hesar royndir hjá javnaðarflokkinum at gogga sær politiskan vinning av bardaganum á arbeiðsmarknaðinum.

Seinast, tá verkfall var, var ein tingmaður teirra enntá so framligur, at hann legði seg út í stríðið á arbeiðsmarknaðinum og var við á barrikadunum.

Fáur og eingin brýggjar seg um menn, ið snobba niðureftir, og als ikki verkafólkið, ið vil hava frið at stríðast sítt egna stríð.

Teir, ið ikki sóu skriftina á vegginum tá, læra lítið og einki av egnum mistøkum, men royna nú aftur í blindum hatri at billa verkafólkinum inn, at júst tjóðveldisflokkurin er fíggindi teirra.

Einki er meiri burturvið enn tað sama.

Tá teir siga seg øtast og vera vónbrotnar av, at tjóðveldisflokkurin skal vera soleiðis vorðin, meina teir tað øvugta.

Sjálvandi høvdu teir verið himmalfegnir, um nakað var í hesum vásinum hjá teimum.

Politisku fluguvektararnir royna eftir førimuni at billa verkafólkinum inn, at einasta sanna verja teirra er til fals. Soleiðis er tað sjálvandi ikki, og tí er vónbrot teirra júst so stórt, sum teir siga tað vera.

Tey, ið fylgja politisku gongdini vita, at fíggjarpolitisku framtøkini til gagns fyri meiniga mannin ongantíð hava verið størri enn tað sama, og fólk flest undrast yvir, hvar uppskot javnaðarfloksins á hesum øki blíva av.

Hóast stórstu skattalættar nakrantíð undir farnu samgongu, og somu gongd undir hesi, so vita vit fullvæl, at fólk hóast hetta hava ringt við at fáa endarnar at røkka saman, men gongdin rætta vegin er so har.

Aðrir leita aðrar leiðir.

Fyri hálvum ári síðan hoyrdu vit formann javnaðarfloksin siga, at hann og javnaðarflokkurin stríddust við at broyta skattalógina soleiðis, at hon kom at gagna ovastu politisku leiðsluni í javnaðarflokkinum persónliga.

"Hetta svekkar mína støðu sum politikkari fyri Suðuroynna," segði arbeiðaravinurin á ovastu rók í javnaðarflokkinum um galdandi skattalóg, sum javnsetti hann og hansara líkar við mannin á gøtunu.

Hann vildi ikki vikna í kongunum og als ikki finna seg í at rinda skatt fyri sína persónligu nýtslu í tí kommunu, hann búði í, eins og snøgt sagt allir aðrir føroyingar gera.

Vit í samgonguni hugsa øðrvísi.

Ferð eftir ferð hava vit broytt skattalógina soleiðis, at meinigi føroyingurin hevur fingið skattalættar - í hesum seinasta umfarinum við 125 mió.kr.

Hinvegin hava vit ikki hoyrt so nógv frá teimum, sum bert høvdu áhuga fyri at broyta lógina fyri egnan vinning.

Soleiðis, at hon kundi tryggja javnaðarmonnum livibreyðið í valdømum, teir ikki brýggja seg um at búgva í.